Føroyingar hava vunni›

Ta› er ein stórur sigur fyri Føroya fólk, at landsst‡ri› er buka› til at sleppa fullveldisætlanini, sigur Edmund Joensen, forma›ur í Sambandsflokkinum í vi›merking til n‡ggju ætlan landsst‡risins

N†GGJA KÓSIN
Edvard Joensen

Føroyingar hava alla grund til at gle›ast, tí alt, sum landsst‡ri› hevur roynt at fingi› upp at standa, er skrambla› fullkomiliga saman, sigur Edmund Joensen, forma›ur í Sambandsflokkinum.

Og ta› er púra burturvi› at tosa um at hava fólkaatkvø›u, sum skal binda komandi løgting og føroyingar annars, sigur sambandsforma›urin.

– Eg má siga ta›, at ta› vóru tríggir ógvuliga lotir og avhølva›ir floksformenn, sum sótu á tí›indafundinum í Tinganesi hóskvøldi›, sigur Edmund Joensen.

Lotir, sigur hann, tí alt, teir hava strí›st fyri í hálvttri›ja ár, er fari› í fillur. Og avhølva›ir, tí ta› var heilt t‡›iligt, at teir høvdu als onga uppbakking fyri sínum politikki, hóast teir royndu at sannføra fólk um naka› anna›.

Sambandsforma›urin sigur, at alt, sum hendan samgongan, og serliga Tjó›veldisflokkurin fór til val uppá, er fari› fyri einki. Og landsst‡r› er gjørt fullkomiliga til láturs, vi› teirri vend, gongdin nú hevur fingi›. Her er høvdi› biti› av allari skomm, nú landsst‡ri› leggur ein politiska ætlan fram, sum gongur beint móti tí, tey annars hava arbeitt vi›.

Væl siga tey, sigur Edmund Joensen, at endamáli› framvegis er fullveldi. Men ta› metir hann hvørki landsst‡ri› ella nakran annan halda vera realistiskt í bræ›i.

Ta› er heilt greitt, sigur Edmund Joensen, at tann fólkaliga mótstø›an, sum er vor›in alt grei›ari vi› tí›ini, hevur noytt landsst‡ri› at venda øllum sínum ætlanum á høvdi›.

Edmund Joensen sigur, at hann sjálvandi frøist um, at ætlanin hjá landsst‡rinum er slept, og at landsst‡ri› nú er fari› aftur til Heimast‡rislógina. Tí ta› er einki anna›, sum hent er.

Yvirtøkurnar, sum nú ver›ur tosa› um, eru heilt í trá› vi› Heimast‡rislógina, sigur hann.

Edmund Joensen metir ta› vera meiningsleyst og tekin um líti› politiskt skil at tosa um fólkaatkvø›ur, sum til allar tí›ir skulu binda føroyska politikkarar og tey til einahvørja tí› sitandi løgting at fylgja ávísum fyriskipanum, sum eitt landsst‡ri í 2001 heldur vera í lagi. Løgtingi› eigur at tilpassa seg teimum umstø›um, sum til einahvørja tí› eru í samfelagnum, sigur hann.

– Vit kunnu bara gle›ast um, at landsst‡ri› er fari› at reka sambandspolitikk, sta›festir Edmund Joensen, forma›ur í Sambandsflokk-inum.

Fullveldisætlanin vend á høvdi›

N‡ggja útmeldingin frá landsst‡rinum í sjálvst‡rismálinum ásetir ikki, nær vit fáa fullveldi. Vit skulu nú hava skiftistí›ina fyrst, og tá hon eftir eitt óvist áramál er li›ug, skulu vit atkvø›a um føroyskt fullveldi

N†GGJA KÓSIN
Magnus Dam og John Johannessen

Landsst‡ri› hevur flutt føroyska fullveldi› langt fram í tí›ina.

Hetta kann sta›festast eftir tí›indafundin í Tinganesi hósdagin, har landsst‡ri› greiddi frá sínum n‡ggju ætlanum í spurninginum um ríkisrættarligu stø›una.

Landsst‡ri› hevur lagt eina ætlan, i› stig fyri stig skal tøma heimast‡rislógina vi› at yvirtaka málsøki, til vit einafer› frammi í tí›in vi› eina fólkatkvø›u sta›festa eina føroyska grundlóg og harvi› føroyskt fullveldi.

Í ætlanini, sum landsst‡ri› leg›i fram, liggja tvær fólkaatkvø›ur. Tann fyrra ver›ur longu í apríl næsta ár, og tá skal fólki› geva landsst‡rinum heimild til at fara ví›ari vi› sínari ætlan.

Ætlanin inniber, at ein avtala ver›ur gjørd vi› donsku stjórnina, har ta› ver›ur sta›fest, at føroyingar innan eitt nærri ásett áramál taka ábyrgdina av øllum málsøkjum í heimast‡rislógini, sum vit í dag ikki hava yvirtiki›.

Samstundis skal ein avtala gerast um, hvussu heildarveitingin ver›ur minka› burtur í einki. Tá komi› er á mál vi› at yvirtaka øll málsøki, og blokkstu›ulin er burtur, skal fólki› aftur spyrjast á einari fólkaatkvø›u um ta› tekur undir vi› einari føroyskari grundlóg.

Tekur fólki› undir vi› føroysku grundlógini, eru Føroyar ikki longur undir donsku grundlógini, og eru vit tá eitt fullveldisríki. Hetta merkir samstundis, at vit tá eisini hava ábyrgdina av herna›armálum, uttanríkispolitikkinum og dómsvaldinum.

Endamáli› hjá landsst‡rinum er framvegis at náa á mál í ætlanini um at fáa føroyskt fullveldi. Men eingin av landsst‡risumbo›unum frá teimum trimum flokkunum í landsst‡rinum vildi á tí›indafundinum geva naka› bo› uppá, nær vit fáa fullveldi.

Landsst‡ri› ásannar, at upprunaliga fullveldisætlanin er miseydna›, men ta› roknar vi›, at danski forsætisrá›harrin um ikki so langa tí› fer at taka upp samrá›ingar vi› landsst‡ri› eftir n‡ggju ætlanini.

– Møguleikin at náa á mál vi› hesum upplegginum er væl betur, enn møguleikin vi› upplegginum, vit høvdu seinast, seg›i løgma›ur á tí›indafundinum.

N‡ggja uppskoti› hjá landsst‡rinum minnir ógvuliga nógv um tey uppskot, andstø›an er komin vi› í málinum. Til dømis minnir javna yvirtøkan av málsøkjum nógv um uppskoti› hjá Javna›arflokkinum til eina sjálvst‡rislóg. Tískil ber til at siga, at samgongan hevur flutt seg nógv móti tí, sum andstø›an vil í ríkisrættarligu stø›uni.

Fullveldi um fimm ár

Heini O. Heinesen heldur, at landsst‡ri› í n‡ggju sjálvst‡risuppskriftini eigur at seta sær sum mál at sta›festa Føroyar sum fullveldi í 2006

N†GGJA KÓSIN
John Johannessen

Forma›urin í tingbólki Tjó›veldisfloksins, Heini O. Heinesen, tr‡r uppá, at ta› fer at bera til at sta›festa Føroyar sum fullveldi eftir n‡ggja leistininum, sum samgongan hevur lagt fyri sjálvst‡ristilgongdina.

Harafturat roknar Heini O. Heinsen vi›, at ta› fer at bera til at sta›festa fullveldi› skjótari enn fleiri vænta eftir hesum leistinum. Hann sær ár 2006 sum eitt lyklaár í tilgongdini. Hetta ári› roknar hann vi›, at ta› fer at eydnast at sta›festa Føroyar sum eitt fullveldisríki.

Hetta er eisini naka›, sum Tjó›veldisflokkurin hevur ført fram seinastu dagarnar, me›an samgongan hevur siti› og samrá›st um n‡ggja sjálvst‡risleistin, sum einafer› skal enda vi› føroyskum fullveldi.

Men restin av samgonguni hevur ikki ynskt at sta›festa hetta ári› sum eitt evstamark.

– Semja er altí› ein slakan á ein ella annan hátt. Ta› vita vit av. Men eg vænti kortini, at ta› fer at bera til at fáa fullveldi eftir hesum leistinum, sigur Heini O. Heinesen.

Taka yvir í heimast‡rinum

Heini O. Heinesen er ein av limunum í Tjó›veldisflokkinum, sum ídnast hevur víst á, at heimast‡rislógin sambært Alf Ross bert er ein delegatión frá dønum, og at yvirtøka av málsøkjum innan heimast‡rislógina tískil ikki er nøkur yvirtøka, tí danir altí› kunnu taka hana aftur ella seta okkum undir umsiting.

Men Heini O. Heinesen heldur kortini, at ta› er rætt av landsst‡rinum at hava lagt eina ætlan, i› sigur, at vit skulu tøma heimast‡rislógina vi› at taka yvir málsøki eftir henni, til eingi eru eftir at yvirtaka.

– Ta› hevur ikki eydanst okkum at fáa í lag ta avtaluna vi› danir, sum vit vildu. Tí mugu vit royna eina a›ra loysn, i› hevur betur møguleika at fáa undirtøku. Men vi› Nyrup er ta› solei›is, at ta› ikki er vist, at hann fer at taka undir vi› hesari ætlanini heldur, sigur Heini O. Heinesen.

Forma›urin í tingbólki Tjó›veldisfloksins vísir á, at politiska stø›an er farin at líkjast ógvuliga nógv stø›uni í 1946, og tí heldur hann ta› vera umrá›andi at finna loysnir, i› kunnu gera, at stø›an ikki endar sum í 1946. Ein møguleika fyri hesum metir hann n‡ggju avtaluna hjá samgonguni vera.

Fólkatkvø›u í rygginum

Heini O. Heinesen heldur teirri fyrru av bá›um fólkaatkvø›unum í n‡ggju ætlanini vera sera umrá›andi. Tí eftir hansara tykki, er ta› hendan fólkaatkvø›an, i› kann styrkja landsst‡ri› mótvegis donsku stjórnini.

– Ein yvirtøka eftir heimast‡rislógini er sum so einki verd. Men vi› eini fólkaatkvø›u í rygginum, sum stu›lar politikkinum hjá landsst‡rinum, kann landsst‡ri› yvirtaka málsøki eftir heimast‡risskipanini til einki er eftir, og vit tískil fáa fullveldi, uttan at danska stjórnin kann gera naka›, sigur Heini O. Heinesen.

Tískil heldur Heini O. Heinesen, at n‡ggja ætlanin er gó›, tá hugsa› ver›ur um, at partarnir hava veri› ósamdir um, hvussu hon skuldi skipast.

– Men eg haldi, at ta› var skeivt av Fólkaflokkinum at fara og fríggja til Javna›arflokkin beinan vegin fyrsta ætlanin miseydna›ist, sigur Heini O. Heinesen.

Løgma›ur hartar Høgna

Anfinn Kallsberg heldur ta› vera burturvi› av Høgna Hoydal at melda út um eitt áramál fyri fullveldi

Høgni Hoydal vil hava fullveldi innan 2006. Hetta heldur løgma›ur vera vitleyst og fullkomiliga órealistiskt at melda út longu nú

ÓSEMJA
John Johannessen

Rok hevur tiki› seg upp í samgonguni um, nær endaliga máli› um fullveldi skal vera rokki›. Me›an Tjó›veldisflokkurin vil, at komi› skal vera á mál í seinasta lagi 2006, so átalar løgma›ur har›liga, at ta› longu nú ver›ur sett eitt evstamark.

Høgni Hoydal hevur í vi›merking til blø›ini bo›a› frá, at n‡ggja sjálvst‡risætlanin hjá landsst‡rinum er ein verulig fullveldisætlan, i› mi›ar eftir at øll málsøki skulu vera komin undir føroyskt vald og at heimast‡rislógin skal vera avrigga› innan ár 2006.

Høgni Hoydal vísir frá sær, at talan er um eina stig fyri stig ætlan og sigur or›arætt: »Ta›, sum uppskoti› byggir á, er, at í seinasta lagi – tildømis ár 2006 skulu øll málsøki vera komin undir føroyskt lóggávuvald og heimast‡rislógin avrigga›. Ta› kann sjálvsagt eisini gerast innan ta tí›.«

Hetta sta›festir forma›urin í tingbólki Tjó›veldisfloksins eisini í samrø›u vi› Sosialin í dag og landsst‡risma›urin í undirvísingar- og mentamálum tosar um ta› sama í grein í vikuskiftisinnlegginum hjá Sosialinum.

Burturvi›

Men løgma›ur er ikki fegin um útmeldingarnar frá Tjó›veldisflokkinum.

– Eg kenni einki til, at vit skulu hava fullveldi innan ár 2006. Ta› er heilt burturvi› at melda út vi› tølum. Landsst‡ri› skal ikki melda naka› út, sum ikki er møguligt, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgma›ur leggur dent á, at ta› ikki ber til at melda eina tí›arætlan út, fyrr enn partarnir hava lagt til rættis eina gongd vi› einari tí›arætlan, sum teir eru púra samdir um.

– Eg havi ikki sæ› brævi›, men eg haldi ta› vera sera óheppi og vitleyst, at Høgni kemur vi› hesari útmeldingini. Hetta er ikki ein útmelding, sum landsst‡ri› stendur fyri, og tí má hon standa fyri hansara egnu rokning, sigur løgma›ur.

Anfinn Kallsberg harmast um, at hetta bræv skal vera sent fjølmi›lunum, tá partarnir júst hava gjørt semju um at lata vera vi› at fara út og grugga n‡ggju ætlaninina.

– Eg kann ikki siga anna› enn, at ætlanin, vit løgdu fram hósdagin, stendur vi›, sta›festir løgma›ur.

Ov langt frá sjálvst‡ri

Forma›ur Javna›arfloksins heldur munin millum sjálvst‡risætlan landsst‡risins og Javna›arfloksins vera, at tann hjá Javna›arflokkinum er nógv meira sjálvst‡rissinna›

N†GGJA KÓSIN
John Johannessen

Hóast endaliga máli› í n‡ggju ætlan landsst‡rissins á sjálvst‡rislei› er fullveldi, heldur Jóannes Eidesgaard tilgongdina móti fullveldinum ikki vera serliga sjálvst‡rissinna›a.

– Samgongan hevur eitt uppskot, har tilgongdin ikki inniheldur sjálvst‡ri, men sum kortini mi›ar ímóti fullveldi. Javna›arflokkurin hevur eitt uppskot, sum leggur upp til sjálvst‡ri, men sum ikki mi›ar móti fullveldi. Hetta er veruligi munurin millum uppskotini, sigur Jóannes Eidesgaard.

Forma›ur Javna›arfloksins vísir á, at Javna›arflokkurin í uppskotinum til sjálvst‡rislóg leggur upp til, at vit yvirtaka málsøki frá dønum í einari n‡ggjari sjálvst‡risskipan, i› greitt tilskilar, at løgtingi› fær evsta vald á teimum, so tey ikki kunnu takast aftur.

– Landsst‡ri› vi› yvirtaka í heimast‡rislógini, sum teir sjálvir og Alf Ross hava víst á, bert er ein kleppur. Hendan lóg er bert ein delegatión, i› letur løgtinginum eitt vald á málsøkjunum, sum stjórnin kann taka aftur.

– Ta› er løgi, at somu menninir, sum hava veri› ímóti heimast‡rislógini sí›ani hon kom, nú seta hana í hásæti. Hetta er ein kúvendig í tí politikki, vit kenna Tjó›veldisflokkin og Fólkaflokkin fyri, sigur Jóannes Eidesgaard.

Yvirdrivi›

Forma›urin í Javna›arflokkinum hevur eftir hvønn miseydna›an samrá›ingarfund millum landsst‡ri› og donsku stjórnina sta›iliga heitt á landsst‡ri› um at sa›la um í fullveldismálinum.

Men nú heldur Jóannes Eidesgaard, at landsst‡ri› alt ov væl hevur fylgt hesi áheitan.

– Landsst‡ri› hevur hálsa› um heilt yvirdrivi›, solei›is at Javna›arflokkurin brádliga er vor›in mest radikali flokkurin á sjálvst‡rislei›. Hetta er ein løgin stø›a at vera komin í. Ta› er heilt t‡›iligt, at ta› ikki er Høgni Hoydal, i› hevur ført pennin í n‡ggja uppskotinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Forma›urin í Javna›arflokkinum sta›festir, at vi› uppskotinum hjá samgonguni liggur evsti myndugleikin í Danmark. Ta› heldur Jóannes Eidesgaard ikki vera skilagott.

– Ta› er umrá›andi at fáa gjørt upp vi› delegatiónsteoriina, sum fylgir vi› heimast‡rislógini, og ta› er ta›, sum Javna›arflokkurin vil. Eg havi satt at siga ilt vi› at skilja, at Høgni Hoydal vil ver›a verandi í statsrættinum í eini 20 ár afturat.

– Poul Nyrup Rasmussen hevur bo›a› frá, at vit kunnu fáa eina skipan, sum ver›ur frábo›a› altjó›a samfelagnum, men hesum tilbo›num vil Høgni Hoydal ikki taka vi›, sta›festir Jóannes Eidesgaard.

1000

orsøkir at ferðast við MAERSK AIR

petur og petur 320 870

1000 kr. av vanliga APEX-prísinum

Frá 23. oktober til og við 10. desember 2000 ber til at ferðast bíliga til og úr Føroyum. Forsølan er frá 16. oktober til 3. desember 2000. Treytin er at tvey ferðast saman. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

Føroyar - Danmark
(Keypmannahavn ella Billund)
ella
Danmark - Føroyar
og aftur 1)

Fyri hvønn
1500,-
+ ferðaavgjøld

Børn 0-2 ár: -90% og 2-11 ár: -50%

1) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Ferðin kann í mesta lagi vara 1 mánað. Minst tvey skulu ferðast saman. Ferðaavgjaldið til Keypmannahavnar og aftur er 335,- kr. og til Billund og aftur 378,- kr. fyri hvønn. EuroBonus.

Haldið jól í Danmark við MAERSK AIR

Frá 8. desember 2000 til og við 7. januar 2001 ber til at ferðast bíliga til Danmarkar og aftur. Forsølan er frá 1. november til 11. desember 2000. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

Føroyar - Danmark
(Keypmannahavn ella Billund)
og aftur 2)

Fyri hvønn
1250,-
+ ferðaavgjøld

Børn 0-2 ár: -90% og 2-11 ár: -50%

2) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðin skal vara millum 7 og 21 dagar. Ferðaavgjaldið til Keypmannahavnar og aftur er 335,- kr. og til Billund og aftur 378,- kr. fyri hvønn. EuroBonus.

MAERSK AIR